# Kjak



**Bjørt Samuelsen**
*løgtingskvinna*

# Rósur til Eyðun og Javnstøðunevndina

Sjálvsagt skulu pápar og mammur hava somu rættindi til løn, tá tey eru í barnsburðarfarloyvi. Greiði dómurin, sum nú er fallin í Føroya rætti, fær vónandi partarnar arbeiðsmarknaðinum beinanvegin at tryggja, at hesin púra natúrligi rættur verður greitt staðfestur í sáttmálunum.

Javnstøðunevndin og Eyðun Jakobsen eiga stóra tøkk fyri, at tey hava ført hetta sera prinsipiella mál.

Føroyar liggja í heimsklassa eftir vesturlendskum mátistokki, tá um ræður at føða børn. Tað er eitt heilsutekin og ein stórur fyrimunur fyri framtíðar arbeiðsmarknaðin. Men, skulu vit varðveita høga burðartalið, er eingin vegur uttanum, at mammur og pápar býta ábyrgdina millum sín at fáa barnsburð og arbeiði at ganga upp í eina hægri eind. Og tað merkir í greiðum orðum, at pápar, í nógv størri mun enn higartil, taka farloyvi í sambandi við barnsburð.

Í juni 2008 varð tíðin, sum foreldur samanlagt hava rætt til barnsburðarpening, longd við 8 vikum upp í 34 vikur. Málið var tá, og er vónandi framvegis, at barnsburðarfarloyvi við løn stigvíst skal leingjast upp í eitt ár. Samstundis eigur barsilskipanin at verða gjørd munandi meira fleksibul, soleiðis at foreldrini í størri mun kunnu leggja farloyvistíðina til rættis eftir teirra tørvi.

Men, ein fyritreyt fyri, at longt barnsburðarfarloyvi ikki skal gerast ein álvarsamur baksláttur fyri mammurnar, í mun til teirra møguleikar á arbeiðsmarknaðinum, eftirlønarviðurskifti v.m. er, at farloyvistíðin verður javnari býtt millum foreldrini.

Og pápar eiga eisini at hava sama rætt sum mammurnar at sleppa at vera um síni børn.

Í dag er ein stór forðingunum fyri hesum, at familjurnar í flestu førum missa munandi meira inntøku, um pápin velur at fara í farloyvi, tí nógv fleiri menn enn kvinnur forvinna væl oman fyri loftið fyri útgjaldið úr barsilsgrunninum. Flestu almennu sáttmálarnir geva rætt til fulla løn undir barnsburði. Men, tað hevur so higartil verið mett bert at galda fyri kvinnurnar.

Fígggjarmálaráðið eigur alt fyri eitt at syrgja fyri, at eingin verður diskrimineraður vegna kyn í sáttmálunum á almenna arbeiðsmarknaðinum. Og ynskir privati arbeiðsmarknaðurin at vera attraktivur fyri unga og virkna arbeiðsmegi, so eigur hann at kvika sær at bøta munandi um sáttmálarnar viðvíkjandi barnburðarrættindum – fyri bæði kvinnur og menn.

Sera harmiligt at Eyðun Jakobsen saman við Javnstøðunevndini skal hava verið noyddur at nýta so nógva tíð og orku upp á at stríðast ímóti almennum arbeiðsgevara, fyri ein rætt, sum átti at verið meira enn sjálvsagdur í 2010.



**Turið Debes Hentze**
*advokatur og mediator*

# Betongjuristar og gummijura

*Ikki heilt skeivt hatta við betonginum, men betongið eiga politikkararnir sjálvir.*

Lógir kunnu vera sum betong at fáast við, tungar at arbeiða við, truplar at tulka, broyta og endurnýggja, og ofta galdandi hóast ótíðarhóskandi í alt ov langa tíð. Men tær eru fundamentið, sum politikkarnir sjálvir hava stoypt og sum bara politikkararnir kunnu bróta upp og stoypa av nýggjum.

Tað er tí ørkymlandi fyri ikki at siga skeivt, tá politikkarar í máttloysi skíra løgfrøðingar betonjuristar, bara tí at løgfrøðingarnir ikki tulka lógina, sum politikkararnir kunda hugsað sær tað gjørt.

### Løgfrøðin er ein veldugur maktfaktor

Hetta álop á løgfrøðina, sigur meiri um politikkaran og politiska stevið enn um løgfrøðingin.

Annað er, at tá politiska stríðið harðnar við orðadráttum um juridiskar tulkingar við álopum á juristar og annað gott fólk, man stundin vera komin at umhugsa tað politiska arbeiði, hvussu arbeiðast skal og hvørjum tørvur er á. Juridiskar diskussiónir hoyra heima í dómstólinum. Men ein sannroynd er, at tá arbeiðslag og samstarv er vánligt og veruligt orðaskifti ein mangulvøra, tá stingur løgfrøðin seg upp, eisini millum politikkararnar, sum ein frelsandi eingil ella eitt loch ness ódjór, um man vil.

Tað var tað fyrsta, sum kom mær til hugs, nú danir reageraðu prompte upp á hatta skjalið, sum føroyingar høvdu hugnað sær við á Føroya Løgtingi um sjórnarviðurskifti okkara. Danir gjørdust varugur við, at her hendi okkurt, sum møguliga átti at hava teirra áhuga, og sum danir ikki høvdu havt møguleika at vera partur í og átalaðu hetta. Grundlógin er jú har.

Sjálvandi loypa danir beint í juraini. Løgfrøðin er eitt sterkt kort, sum verður s p æ l t hvørja ferð samskiftið skurrar. Har hevur tú upp á skrift nøkur orð, tú ikki soleiðis kann skúgva tær undan. So tá Høgni Hoydal vil vera við, at maktpolitikkur dana verður fjaldur í løgfrøðisligum hami, havi eg hug at skoyta uppí, at ja, løgfrøðin vísir sína veldugu makt, hvørja ferð politikararnir ikki duga tað snildi, sum krevst til samráðingar og tí sleppa løgfrøðini ov nógv framat.



Bjarni Djurholm
løgtingsmaður

## Betongjura og markeringar

**Politisku markeringarnar umvegis inntøkutrygd og stjórnarskipan eru tí í ...sta lagi uttan innihald, ...m lagi beinleiðis**

Hatta svarið hjá dønum var so upplagt, at tað ger ilt, og var hetta neyvan seinastu ferð, vit hoyrdu tað. Hatta er tað sama danir hava sagt í øldir. Nær læra føroyingar, at mótvegis eini yvirvøld er tað snildi heldur enn konfrontatión, sum gevur úrslit – uttan so at beinleiðis uppreistur veruliga er ein møguleiki.

### Politikkur ella jura

Vit hava betongjura og gummijura, sigur Jógvan Sundstein, fyrrv. løgmaður, í áhugaverdari grein.

Nei vit hava ikki gummijura. Tað at tulkingarmøguleikarnir eru nógvir, tí tey faktisku viðurskiftini eru ymisk, merkir ikki, at jurain politisk kann togast og tambast. Jura verður tulkað juridiskt. Vit kunnu tosa jura ella politikk, men ikki um juridiskar glíðibreytir ella gummijura.

Eg haldi meg tó skilja á Jógvani Sundstein, at tá hann tosar um gummijura, tosar hann út frá sannroyndum um, at góð samstarvsevni og samstarvsvilji bera langt – og at jurain tá fær minni týdning. Tað er so satt, sum tað er sagt. Lógir eru jú gjørdar við orðum og kunnu broytast við orðum, og hava tað makt, politikkaranir geva teimum. Er ikki pláss fyri orðinum, og samskiftið er litað av konfrontatión og manglandi virðing, so fella vit aftur á juraina, sum ikki er frameftirlítandi, sum politikkur eigur at vera tað, men bert ein staðfesting av status quo juridiskt.

### »Processen mangler«

Processen mangler, segði statsministarin Løkke Rasmussen, sum á veðurlagsráðstevnuni í Kbh. herfyri lærdi ikki so lítið um týdningin, processin hevur. Er henda ikki í topp, gerst løgfrøðin lættliga snávingarsteinurin.

Á veðurlagsráðstevnuni í Kbh. kom fram, at danir saman við nøkrum av luttakaralondunum frammanundan høvdu orðað eitt skriv um eina fyribilsavtalu. Líkamikið hvat stóð í hesum skrivi, so skapti hetta skriv stóra órógv og var støðugt tikið fram sum tekin sum ódugnaliga handfaring dana av processini.

Sjálvt um vit í Føroyum hava loyvi at skriva, hvat vit vilja uttan at spyrja danir, so er vert at umhugsa leiklutin hjá dønum longu nú í framhaldandi arbeiðinum.

Kundi hugsa mær at verið fluga á vegginum í víðkaðu rættarnevndini og hoyrt, hvussu væl samansjóðað politiska stevið er. Er vakra myndin í bløðunum við undirtekstinum, at allar forðingar nú eru av vegnum eftirfarandi? Vónandi er tað ikki so, at politikkararnir av ótta fyri at missa tamarhald á innanhýsis samarbeiðinum aftra seg við at taka samband upp við tann partin, sum politiskt og løgfrøðiliga ikki slepst undan at taka samband við fyrr ella seinni – »tí danir bara seta kílar í«.